Góða dagbók!

Nú er seint, so eg fari skjótt at leggja meg. Eg siti í songini og skrivi, meðan eg lurti eftir nýggjastu fløguni hjá mær. Eg haldi, tað er got at lurta eftir tónleiki, áðrenn eg fari í song, tí so sovni eg altíð beinanvegin. Annars plagi eg onkuntíð at lesa, áðrenn eg leggi meg. Veitst tú, hvat hendi í dag? – Eg má siga tær tað. So veit eg, at tað verður okkara millum.

Jógvan í 7. flokki, sum eg havi so góðan hug á, bjóðaði mær í føðingardag hjá sær í morgin. Hvat heldur tú? Eg eri einasta genta í 6. flokki, sum eri boðin við. Nú rokni eg við, at hann eisini leggur eitt sindur í meg.

Eg gleði meg so nóg vil í morgin. Eg skriv aftur í annaðkvøld. Tá verður helst okkurt spennandi at skriva um.

Hanna